# VINNUHÚSIÐ

HOUSE OF INDUSTRY

# Semja við arbeiðarafeløgini

Framløga fyri limum
2. juni 2022

Jórun Gardar, ráðgevi

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Skrá

1. Samráðingarnevndin
2. Lønarhækking og karmur
3. Aðrar sáttmálabroytingar
4. Sersáttmálar

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Samráðingarnevndin

**Nevndin í FAG:**

Bogi Jacobsen, formaður

Høgni Hansen, næstformaður

Kristoffur Laksá, samráðingarleiðari

Jón Sigurdsson

Jóhanna á Bergi

Fróði Magnussen

Jens Meinhard Rasmussen

Árni Ellefsen

Odd Eliasen

**Harafturat:**

Magnus Magnussen, form. FHMF











VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Lønarhækking og karmur

| | | |
|---|---|---|
| 1. mai 2022 hækkar lønin | 3,50% | til kr. 140,30 |
| 1. mai 2023 hækkar lønin | 3,50% | til kr. 145,21 |

| | |
|---|---|
| Karmurin fyrra árið | 3,80% |
| Karmurin seinna árið | 4,04% |

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Paralellar samráðingar

- Øll fimm arbeiðarafeløgini byrjaðu samráðingarnar saman

- Tey fóru síðani sundur í tveir bólkar:

  Havnar Arbeiðskvinnufelag fyri seg

  Føroya Arbeiðarafelag, Hanar Arbeiðarafelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag fyri seg

- Tvær ymsar semjur

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Øll fimm arbeiðarafeløgini

**Høvuðssáttmálin:**

Tann 1. mai 2022 verður starvsaldursviðbótin henda:

Eftir 2 ára starvstíð verður viðbótin 2,5 % av grundlønini
Eftir 4 ára starvstíð verður viðbótin 3,5 % av grundlønini
Eftir 6 ára starvstíð verður viðbótin 4,0 % av grundlønini
Eftir 8 ára starvstíð verður viðbótin 5,0 % av grundlønini
Eftir 10 ára starvstíð verður viðbótin 6,5 % av grundlønini

Eftir 11 ára starvstíð verður viðbótin 8,0 % av grundlønini Viðbótin fyri 11 ára starvstíð fær gildi 1. mai 2023.

# Øll fimm arbeiðarafeløgini

**Høvuðssáttmálin:**

Greinin um frídagar verður broytt til:

*"Átrokandi arbeiði, sum verður gjørt 1. mai, jólaaftan, og eftir kl 12 hesar dagar, verður lønt við dupultari løn, so leingi halgan varar. Tó verður arbeiði eftir kl 13.00 jólaaftan lønt við dupultari sunnu- og halgidagsløn."*

# Øll fimm arbeiðarafeløgini

**Høvuðssáttmálin:**

Til greinina um limaskap:

*"Sáttmálapartarnir og limirnir skulu hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis forða fyri, at arbeiðsgevarar og arbeiðsfólk skipa seg í ávikavist arbeiðsgevarafelag og arbeiðarafelag."*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Øll fimm arbeiðarafeløgini

**Fastlønarsáttmálin:**

Aftaná setningin "*Fyri yvirtíðararbeiði verður goldið yvirtíðarløn samsvarandi ásetingunum í § 8 í høvuðssáttmálanum.*" verður sett inn:

*"Yvirtíðarløn kann, um arbeiðsfólk ynskir tað, og arbeiðsgevarin samtykkir, avspákast í sama lutfalli, sum yvirtíðartaksturin í mun til vanligu lønina.*

*Arbeiðsgevarin avger í samráð við arbeiðsfólkið, nær avspákingin skal vera og boðar frá hesum í góðari tíð, tvs. vanliga ikki seinni enn 4 arbeiðsdagar frammanundan.*

*Avspákingin skal vanliga vera í heilum ella hálvum døgum og skal vera av í seinasta lagi tveir mánaðir aftaná, at viðkomandi yvirtíðararbeiði er útint.*

*Tímar, sum ikki eru avspákaðir í hesum tíðarskeiði, verða útgoldnir sum yvirtíð. Tílík avspáking skal ikki leggjast á dagar, sum frammanundan eru frídagar"*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Øll fimm arbeiðarafeløgini

**Fastlønarsáttmálin:**

Orðingin í grein 4 verður broytt til:

*"Verður arbeiðari, sum er settur sambært hesum sáttmála, orsakað av sjúku, sum gevur honum rætt til dagpening sambært lóg um dagpening, ikki førur fyri at gera sítt arbeiði, rindar arbeiðsgevarin munin millum tað, ið arbeiðarin fær útgoldið av dagpeningi, og tað hann vildi havt fingið í løn í starvinum. Veitingin frá arbeiðsgevara stendur bert við í tveir mánaðir."*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Øll fimm arbeiðarafeløgini

**Fastlønarsáttmálin:**

Grein um uppsagnarfreistir verður broytt til:

*"Fyri fastlønt arbeiðsfólk er uppsagnarfreistin frá arbeiðsgevara síðu:*

| | |
|---|---|
| *upp til 6 mánaða starvstíð:* | *1 mánaði til ein 1. í mánaðinum* |
| *frá 6 mdr. til 2 ára starvstíð:* | *2 mánaðar til ein 1. í mánaðinum* |
| *meira enn 2 ára starvstíð:* | *3 mánaðir til ein 1. í mánaðinum* |
| *meira enn 5 ára starvstíð:* | *4 mánaðir til ein 1. í mánaðinum* |

*Uppsagnarfreistin við uppsøgn frá arbeiðsfólkinum: 1 mánaði til ein 1. í mánaðinum.*

*Uppsøgnin skal vera skrivlig fyri báðar partar."*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Øll fimm arbeiðarafeløgini

**Álitisfólkaskipanin:**

Í punkt 1 í Álitisfólkaskipanini verður “*5 ella fleiri fólk eru í vinnu*” broytt til “3 ella fleiri fólk eru í vinnu”.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Tey fýra feløgini (FA, HAF, KAM & KAK)

**Fastlønarsáttmálin:**

Í greinini um aðrar ásetingar eftir verandi orðing: “*Har annað ikki er nevnt í hesum sáttmála eru ásetingarnar í høvuðssáttmálanum galdandi fyri fastlønt arbeiðsfólk, tó ikki reglurnar um arbeiðstíð og løn, um ikki víst er til hesar reglur í hesum sáttmála.*”, verður sett inn:

“*Tá tímalønt fólk hava arbeitt út í eitt hjá sama arbeiðsgevara í tvey ár, so skal arbeiðsgevarin taka upp spurningin um møguliga setan av fólkinum sum fastlønt, um løntakarin setur fram ynski um hetta.*

*Frávera í minni enn 14 dagar ávirkar ikki útrokningina av nevndu starvstíð, og heldur ikki ávirkar sjúkrafrávera ella onnur lóglig frávera nevndu útrokning.*”

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Tey fýra feløgini (FA, HAF, KAM & KAK)

**Protokollat um høvuðsavtalu:**

Partarnir binda seg til í sáttmálaskeiðinum 2022 - 2024, at taka upp samráðingar um høvuðsavtalu partanna millum.

Hetta protokollat verður skrivað undir í 5 eintøkum, soleiðis at hvør partur fær eitt eintak.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Havnar Arbeiðskvinnufelag

**Høvuðssáttmálin:**

Broyting í grein 9 um arbeiðstíð, døgndrift og skiftisvakt.

1. Tíðspunktini fyri normalarbeiðstíðina eru strikað úr sáttmálanum. Orðingin sum stendur eftir er: ”*Normalarbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, og skal vera 8 tímar um dagin frá mánadegi til og við fríggjadegi, og skal tann dagliga arbeiðstíðin liggja millum kl. 7 á morgni og til kl. 18 á kvøldi, hetta soleiðis sum partarnir á teimum einstøku arbeiðsplássunum semjast um.*”
2. Kravið um at atkvøða við seðlum er burtur.
3. ”*Har eitt arbeiðspláss natúrliga kann býtast upp í fleiri deildir, kunnu ymsar arbeiðstíðir avtalast millum arbeiðsfólkið saman við álitisfólkið og virkið, sum frávíkja normalarbeiðstíðini.*”

   (skal ikki longur góðkennast av fakfelagnum).

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Havnar Arbeiðskvinnufelag

**Høvuðssáttmálin:**

Grein 14, stk. 2 verður broytt til :

*Verður løntakari, sum hevur arbeitt hjá sama arbeiðsgevara í meira enn 6 mánaðir út í eitt, óarbeiðsførur orsakað av einum arbeiðsskaða, sum kann prógvast við læknaváttan, hevur arbeiðsgevari, aftaná at tíðarskeiði í stk. 1 er endað, skyldu at rinda munin millum dagpeningaveitingina og vanligu lønina, sum løntakari hevði fingið útgoldna, um viðkomandi ikki fekk skaðan.*

*Gjaldsskyldan hjá arbeiðsgevaranum stendur við inntil løntakari aftur er arbeiðsførur tó í mesta lagi 5 mánaðir aftaná, at arbeiðsskaðin er hendur.*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Havnar Arbeiðskvinnufelag

**Høvuðssáttmálin:**

Grein grein 20, stk. 3 verður broytt til:

*“Verður løntakari, sum hevur arbeitt hjá sama arbeiðsgevara í meira enn 6 mánaðir út í eitt, óarbeiðsførur orsakað av einum arbeiðsskaða, sum kann prógvast við læknaváttan, kann viðkomandi ikki sigast úr starvi fyrr enn 7 mánaðir aftaná arbeiðsskaðin er hendur. Hetta er tó bert galdandi, inntil løntakarin aftur er arbeiðsførur*

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Havnar Arbeiðskvinnufelag

**Høvuðssáttmálin:**

Uppsagnartíðin í grein 20 verður broytt til:

| | | |
|---|---|---|
| Minni enn 6 mánaðir starvstíð: | 5 | arbeiðsdagar. |
| Meira enn 6 mánaðir starvstíð: | 7 | arbeiðsdagar. |
| Meira enn 1 ára starvstíð: | 10 | arbeiðsdagar. |
| Meira enn 2 ára starvstíð: | 15 | arbeiðsdagar. |
| Meira enn 3 ára starvstíð: | 20 | arbeiðsdagar. |
| Meira enn 5 ára starvstíð: | 30 | arbeiðsdagar. |

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Havnar Arbeiðskvinnufelag

**Protokollat:**

Partarnir eru samdir um at fara undir samráðingar um ein fastlønarsáttmála fyri reingerð í sáttmálaskeiðnum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Partarnir fara undir arbeiðið at skipa viðbøturnar í grein 3 í sáttmálanum fyri arbeiðið á hotellum, gistingarhúsum, matstovum v.m. øðrvísi, har viðbøturnar verða færri í tali, uttan at hetta samlað sæð broytir kostnaðin.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Sersáttmálar – Gistingarhússáttmálin

**Øll fimm arbeiðarafeløgini:**

Eftirlønin á 4% í grein 5, stk. 1 hækkar soleiðis:

| | |
|---|---|
| Tann 1. januar 2023 | 1% |
| Tann 1. januar 2024 | 1% |

Eftir hetta hækkar eftirlønargjaldið 1 prosentstig tann 1. januar á hvørjum ári, til gjaldið kemur upp á lógarásetta eftirlønargjaldið.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Sersáttmálar – Gistingarhússáttmálin

**Havnar Arbeiðskvinnufelag:**

1. Sáttmálin verður millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag

2. Viðbøturnar í grein 3 fyri arbeiðið innanfyri arbeiðsætlanina eru uppsettar øðrvísið

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Sersáttmálar – arbeiðið á flogvøllinum

**Føroya Arbeiðarafelag:**

1. Næsta reglubrot í grein 2 verður soljóðandi:

*Arbeiðsfólkið skal har hetta ber til hava minst 8 tímar frí millum tvær vaktir. Vaktir er arbeiðsdagur sambært arbeiðsætlan. Eru minni enn 8 tímar ímillum 2 vaktir eigur arbeiðsfólkið rætt til tímaløn á byrjunarstøði í høvuðssáttmálanum x 4."*

2. Næsta reglubrot í grein 3 verður soljóðandi:

"Fyri arbeiði innan fyri arbeiðsætlanina verður harumframt latnar hesar viðbøtur av byrjanarlønini í høvuðssáttmálanum:

| | |
|---|---|
| Mánadag til fríggjadag millum kl. 18.00 og 07.00 | 19% pr. tíma |
| Leygardag | 28% pr. tíma |
| Sunnudagar, halgidagar og skeivar frídagar | 37% pr. tíma |

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY